## Suðuroyar Tónleikafelag skipað seg

Aðalfundur í Suðuroyar tónleikafelag varð hildin í stóra Pakkhúsi í Vági leygardagin. Fleiri evni vóru havd á lofti, m.a viðurskifti við venjingarhølum í Vági og Tvøroyri, at skipa fyri stuðultiltaki til frama fyri tónleikafelagið, og umrødd voru eisini og fíggjarviðurskifti fyri 2009-2010. Síðani varð nevndarval og nevnd vald og hon skipaði seg við Trygva Strøm sum formanni og Joan Poulsen sum næstformanni. Kassameistari er Kristian Holbæk, Jonhild Nielsen er srkviari og Hjalmar Magnussen er vanligur nevndarlimur. Eykalimir eru Rani í Trøðini og Jens Arni Leo



## Færri ferðast á veingjum

Í januar í ár hava 12.246 fólk ferðast um floghavnina. Hetta er 3,3% færri enn í januar í fjør, tá 12.669 ferðafólk fóru um floghavnina. Í januar í ár vóru tilsamans 327 komur og fráferðir. Tað er ein øking uppá 8,3% í mun til januar í fjør. Samlaða farmamongdin, t.e. postur og annar flogfarmur, var í januar í ár 50,8 tons móti 49,6 tonsum í januar í fjør. Hetta svarar til eina framgongd uppá 2,4%.

# Fongsul og útvísing fyri at stjala mat

**Tveir russar fingu í Føroya rætti í gjár 14 daga fongsulsrevsing og at verða vístir av landinum. Dómurin var fyri tjóvarí. Alt tjóvagóðsið kom aftur í aftur**

FØROYA RÆTTUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

- Viðferðin, sum hesir menninir hava fingið, er í andsøgn við, hvussu fittir føroyingar eru, tá ið teir fara umborð á russisk skip á jólum og bera teimum mat.

So bersøgin var advokaturin Poul Hansen í Føroya rætti í gjár, eftir at Føroya ræ55ttur hevi dømt tveir ungar russar fyri tjóvari. Poul Hansen var verji hjá øðrum manninum.

Fleiri russisk skip liggja við bryggju her og har. Manningarnar keða seg, og á fleiri skipum er kosturin bæði lítil og vánaligur.

Eitt av hesum skipum var Kaptan Butrimov, sum síðan stutt eftir nýggjár hevur ligið í goðshavnini í Ánunum.



*Russiski trolarin Kapitan Butrinov hevur í ein mánað ligið í Ánunum og bíðað eftir fiskiloyvi*

### Sótu eina viku

Mánadagin 25. januar vórðu tveir av manningini meldaðir fyri stuldur, handtiknir, vóru í grundlógarhoyri og hava sitið varðhaldsfongslaðir til í gjár, tá ið teir komu fyri rættin.

Ákæruritið fevndi um seks ymiskar stuldrar. Teir høvdu verið í Rúsuni í Klaksvík og tikið vín, Í FK og tikið matvørur og toilettvørur, ítróttarklæðir í einum handli, eina fartelefon í Telebúðini, knívar í einum handl, og í einum øðrum handli høvdu teir tikið matvørur.

Hetta var tað, sum Karen-Marie Olesen, fúti førdi fram sum ákæri.

Annar maðurin noktaði at hava framt nakran stuldur, men hin viðgekk alt uttan stuldurin í Rúsuni og í FK. Hann segði eisini, at teir høvdu verið báðir um stuldrarnar.

Ákæran um stuldur í Føroya Keypsamtøku varð slept, tí eingi prógv vóru fyri nøkrum.

Hinvegin varð nógv gjørt burturúr, at menninir fleiri ferðir høvdu verið í Rúsuni í Klaksvík. Tvey vitni, tvey starvsfólk í Rúsuni vórðu kallað inn, og harafrat vórðu nakrar upptøkur frá vakmyndartólunum í handlinum vístar.

Maðurin, sum játtaði at hava stolið, segði í rættinum, og teir høvdu gjørt hetta, tí teir fingu so vánaligan mat umborð. Hinar lutirnar høvdu teir tikið til at hava heim við sum gávur.

### Løgin atburður

Vitnini úr Rúsuni søgdu, at tað var atburðurin hjá monnunum, sum gav illgruna um, at teir stjólu. Tí høvdu tey eyga við monnunum. Ein dag sá eitt starvsfólk annan av hesum báðum russarunum taka eina lítla vínfløsku, og hon fór út í tún aftaná honum og tók fløskuna úr lummanum. Tær báðar kvinnurnar í Rúsuni vóru sannførdar um, at teir báðir høvdu tikið annað ta vikuna, tí nakrar fløskur voru horvnar. Hin maðurin hevði keypt og goldið, eins og fleiri aðrir menn av skipinum eisini høvdu gjørt.

Tann dagin, tá ið annar av monnunum varð tikin við vínfløskuni í lummanum, hevði eiðarin ringt til politiið, men tað bar ikki til at fáa politiið at koma beinanvegin, tí hetta var langt út á seinnapartin, og bara politiið í Havn svaraði.

Tá so annar maðurin kom inn at avreiða fløskur mánadagin eftir, ringdi hon til politiið. Hon vildi vera við, at ein av fløskunum, sum maðurin avreiddi, var ein stolin fløska. Til hetta svaraði russarin, at fløskurnar hevði hann funnið umborð á skipinum.

### Tóku mat

Sama dag sum Rúsan meldaði stuldurin, meldaði eigarin av matvøruhandlinum beint við síðuna av eisini menninar fyri stuldur. Hesin maðurin vitnaði eisini.

Hann hevði sæð annan russaran koyra matvørur í lummarnar, hann fór aftaná og tók ymiskar matvørur úr lummum hansara. Síðan tók hann ryggsekkin av hinum russaranum, kannaði ryggsekkin, men har var einki tjóvagóðs at finna. Eitt kartong av róma var horvið úr bilhúsi hansara, varnaðist hann aftaná.

Handilsmaðurin varð biðin at koma á politistøðina at peika út, hvørjar vørur vóru úr hansara handli, og soleiðis fekk hann alt aftur.

Hinir handlarnir fingu eisini alt sítt aftur.

Ákærin helt, at tað vóru herandi umstøður, at teir høvdu verið tveir um stuldrarnar, sum vórðu framdir yvir fleiri dagar. Hon vildi hava fongsusrevsing og útvísing.

### Langt úti

Verjin Poul Hansen helt ákæran fara alt ov langt. Hann kundi ikki krevja fríðøming, tí maðurin, sum hann vardi, hevði játtað seg sekan í fýra av teimum seks ákærunum. Lítla vínfløskan, sum hann hevði tikið, var ikki verd meira enn 30 krónur. Alt varð eisini komið aftur.

- Viðferðin, sum hesir menninir fáa, er í andsøgn við, hvussu fittir føroyingar eru á jólum, tá ið fólk fara umborð á russisku skipini at bera teimum mat. Vit sóla okkum allan desember mána í góðsku, segði Poul Hansen.

Hann helt, at menninir áttu at sloppið við eini lítlari bót. At krevja fongsul helt hann vera vitleyst, tí teir høvdu sitið varðhaldsfongslaðir í eina vika, og tað mátti verið ríkiligt, segði hann og helt hetta vera lítið at útvísa menninar fyri.

### Munur á fólkasløgum

Poul Hansen kom inn á at gera mannamun.

- Eg eri sannførdur um, at samfelag okkara hevði ikki soleiðis við norðurlendingum ella es-borgarum, sum tað er farið við hesum russunum, segði Poul Hansen.

Verjin hjá hinum manninum, Óla Jákup Kristoffersen tok undir við starvsfelaganum.

- Eg havi upplivað fleiri revsimál, men eg veit ikki um, at so nógv r gjørt burtur úr einum so lítlum máli, segði hann og kravi fríðøming. Í øðrum lagi helt hann bót vera nóg mikið.

Hann nevndi eisini, at tjóvagóðsi fyri tað mesta var matur, sum teir høvdu tikið, ti teir fingu so vánaligan mat umborð. Alt var eisini komið aftur í aftur, og tí var einki endurgjaldskrav.

Dómarin var kvikur við dóminum. Hann dømdi báðar menninar sekar í stuldri. Revsingin var 14 daga fongsulsrevsing. Teir skudu to ikki i fongsul, tí teir høvdu sitið varðhaldsfonglaður í eina viku, og tað gekk upp móti hvør øðrum.

Tá ið ein útlendingur í Føroyum verður revsaður við fongsli, fylgir útvísing við. Hjá hesum báðum monnunum er treytin, at teir ikki mugu koma aftur til Føroya í trý ár.

### Kundu ikki kæra

Eftir at teir og sakførarnir høvdu prátað saman, segði Poul Hansen, at tað var ikki annað enn at gra enn at taka við dómunum. Valdu teir at kæra, noyddust teir at sita í Føroyum og bíða í hvussu er til juni mánað, tá i landsrætturi næstu ferð kemur til Føroya.

Tá ið teir høvdu tikið við dómunum og eru útvístir, spurdi sakførarin, um menninir ikki kunnu fara umborð á skipið aftur í Ánunum. Nei, segi fútin, og grundgevingin var, at eingin veit, nær skipið fer úr Føroyum, og hvagar tað fer. Menninir skulu tí sendast heim við flogfari, og ferðina skal reiðaríið rinda.

Dómarin gjørdi urskurð um, at menninir skulu sita í varðhaldinum, til teir verða sendir heim. Ta avgerðina kærdi Poul Hansen.

Menninir vóru illa við, tá ið teir fingu at vita, at teir vóru dømdir at gjalda sakarmálsútreiðslurnar. Hvussu nógv er tað? vildu teir vita. Tað visti dómarin ikki.

Karen Marie Olesen sissaði menninar við, at eiga teir ikki peningin, so kunnu teir ikki gjalda.